# Nýggjur traktorur ger tað arbeiðsligari

LANDBÚNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landbúnaður ella ítriv. Tað er sum so líkamikið. Hjá teimum flestu á bygd, sum eiga jørð, er jørðin einsamøll ikki nóg mikið sum livibreyð.

Jack Thomsen, bróðurin, Jógvan og Ingolf Jacobsen, sum er giftur mammuni, Petriciu, eiga so mikið av jørð, at nóg mikið er av seyðakjøti til húsbrúks í familjuni.

Men jørðin og seyðurin skulu røkjast, og tað krevur tíð og orku í frítíðini.

Teir hava havt ein lítlan traktor, sum ikki er nógv verdur. Nú hava teir so gjørt íløgur í ein nýggjan.



*Tey eru í holt við at koyra hoyggj inn. - Traktorurin er eitt hent arbeiðsamboð, sigur Jack Thomsen, sum stendur ímillum børnini á myndini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Væl egnaður

Jack Thomsen, sum á myndini sæst saman við hundi og tveimum smábørnum, sigur, at teir eru ógvuliga væl nøgdir við traktorin.

- Motorurin er 17 hk., og vognurin koyrir smáar 30 km. um tíman. Hann hevur 5 »høg« kervi fram og eitt aftur og 5 »lág« kervi fram og eitt aftur. Sostatt hevur hann tilsamans 10 kervi fram og 2 aftur. Vognurin er 4-hjólstrektur og hevur hydrauliska last.

Jack Thomsen, sum sjálvur er fiskimaður, sigur, at hetta er ein vælegnaður traktorur á einum smáplássi.

Nýggi traktorurin kostar stívliga 100.000 krónur.

# Tavan gevst fyrr við gulllaksinum í ár

**- Tá ið vit gevast við gulllaksinum um eina viku ella 14 dagar, fara vit at framleiða upsa til portiónir, sigur Kári E. Jacobsen, virkisleiðari á Tavuni í Leirvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Leirvík: Tavan í Leirvík fer at gevast nakað fyrr við gulllaksinum í ár enn vanligt. Orsøkin er, at um eina viku ella 14 dagar hevur virkið nøktað tær avtalur, ið virkið hevur í ár.

Kári E. Jacobsen, virkisleiðari, sigur, at Tavan leverar gulllaks alt árið til keyparar í Noregi, Onglandi og Svøríki.

- Farsið liggur á goymlu í Runavík, og haðani verður tað sent av landinum til útlendsku marknaðirnar.

Hann sigur, at eins og marknaðurin fyri onnur fiskasløg er rættiliga trekur í løtuni, hevur Tavan ikki sáttmálar til fleiri enn eini 4000 tons av ráfiski í ár.

- Men fiskiskapurin hjá skipunum hevur verið góður og støðugur, síðan tey fyrstu fóru á gulllaks fyrst í juni.



*Tavan í Leirvík virkar gulllaks til fars um summarið og upsa til portiónir um veturin. Í síðstu viku arbeiddu tey við trimum vaktum og virkaðu heili 500 tons av gulllaksi til fars.*

### Minni enn vanligt

Tavan tók ímóti fyrstu gulllaksalastini, 10. juni í ár, og síðan hevur nógv virksemið verið á virkinum í Leirvík.

- Eitt miðalár hava vit arbeitt eini 6.000 tons, og onkuntíð hava vit arbeitt heilt út í oktober, sigur Kári.

Størsta árið hjá Tavuni í nøgd er 8.200 tons í ráfiski. Hann vísir á, at ein av fyrimununum við virkseminum í Leirvík er, at virkið kann levera gulllaksafars til síni viðskiftafólk alt árið.

- Vit senda vanliga tær seinastu nøgdirnar avstað, tá ið vertíðin byrjar aftur.

Alla síðstu viku arbeiddu tey við trimum vaktum á Tavuni, og eini 500 tons av ráfiski fóru ígjøgnum maskinurnar.

Nú virkið í Miðvági er stongt, hevur virkið í Leirvík keypt gulllaks frá fýra skipum, Vesturleika, Vestursøka, Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum.

Sundaberg gjørdi einar tríggjar túrar á gulllaksi. Teir landaðu tvær ferðir í Miðvági og seldu ein túr uttanlands.

Nú fiskar skipið gulllaks, sum verður frystur umborð.

### Upsi í portiónir

Uttanfyri gulllaksavertíðina, arbeiða tey upsa á virkinum í Leirvík.

- Vit kunnu fara í gongd við upsanum, so skjótt gulllaksurin er av. Men helst verður steðgað í eina viku, áðrenn vit fara at keypa upsa, sigur Kári E. Jacobsen.

Á Tavuni verður allur upsin framleiddur til portiónir.

# Grønlendski fiskimálaráðharrin kemur á vitjan

**Hósdagin kemur grønlendski fiskimálaráðharrin, Simon Olsen, til Føroya á vitjan. Hann fer avstað aftur sunnudagin**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*

Hósdagin, 4. september, kemur grønlendski fiskimálaráðharrin, Simon Olsen, á vitjan í Føroyum. Tað verður okkara fiskimálaráðharri, Jacob Vestergaard, sum tekur ímóti.

Stutt eftir komuna, verður politiskt prát á Skipaeftirlitinum í Miðvági, og longu tíðliga seinnapartin hósdagin verður vitjað á Kollafjørð Pelagic.

Hósdagin verður eisini vitjað á Rækjuvirkinum á Oyri, har Simon sleppur at smakka føroysku rækjurnar.

Fríggjadagin verður vitjað á Tavuni í Leirvík, har tey skjótt fara at gevast við gulllaksinum í ár.

Í Leirvík verður eisini vitjað á Bátasavninum, og síðan verður farið í Norðoyggjar, har Føroya Reiðarafelag verður vertur við ábit á Viðareiði.

Seinnapartin fríggjadagin verður vitjað á Kósini í Klaksvík, og síðan verður farið aftur til Havnar.

Grønlendski fiskimálaráðharrin fær ein døgurðabita á Hotel Hafnia fríggjakvøldið, har Jacob Vestergaard verður vertur.

Leygardagin kl. 10 verður checkað út á Hotel Føroyum.

Fyrrapartin leygardagin verður farið til Suðuroyar við Brimli, og á ferðini suður verður politiskt prát millum Simon og Jacob.

Umborð á Brimli verður sjálvsagt eisini ábit.

Seinnapartin leygardagin vitjar Simon Hotel Øravík og síðan verður farið runt í oynni við honum.

Farið verður av aftur Tvøroyri við Brimli sunnudagin kl. 12 og vestur á Miðvág.

Simon Olsen fer úr Føroyum aftur sunnudagin kl. 17.30 við flogfarinum hjá Atlantsflog.



